# Nýggju amboðini rigga væl

**Djóralæknin Jústinus Olsen luttók í grindadrápinum í gjár. Hann heldur, at drápið gekk væl. - Nýggi knívurin og sóknarongulin gera tað lættari, og tað gongur skjótari at drepa hvalin, sigur hann**

GRINDADRÁP
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Jústinus Olsen, djóralækni, var við í grindadrápinum í gjár. Hann letur væl at nýggju amboðunum, sum verða nýtt meira og meira. Nýggi knívurin, sum Jústinus heldur í hondini á myndini, verður kallaður fyri ”mønustingari”. Sóknarongulin, sum hevur eina kúlu í endanum, verður kallaður fyri ”blásturkrókur”.

– Tey nýggju amboðini rigga fínt. Tey vísa seg at vera effektiv, og alt gongur nógv skjótari. Við mønustingaranum sker tú sama stað, sum tá ið tú sker á háls. Tú stingur knívin niður í skák aftureftir beint aftanfyri blástrið. Tú vendir knívin á tvørs. Hvalurin missir vitið beinanvegin og doyr. Soleiðis verður pínan hjá hvalinum so lítil og stutt sum gjørligt, sigur Jústinus Olsen.

### Tíðin á muni

Hann helt seg síggja fimm tílíkar knívar í drápinum í gjár. Hann leggur tó dent á, at tú skalt duga at stinga og skera háls, um tú skalt nýta hendan knívin. Hóast tað kann tykjast lætt, so skal eitt ávíst handalag til.

Blásturkrókurin verður stungin í blástrið, og síðani verður hvalurin hálaður upp á land. Hetta ger, at alt gongur skjótari fyri seg, og hvalurin fær ikki óneyðug sár.

– Blásturkrókurin verður meira og meira nýttur. Hann ger tað lættari hjá grindamonnunum, og hann minkar um pínuna hjá hvalinum. Tað eru tó summi, sum enn nýtta tað gamla slagið, sigur Jústinus.

Sum heild er tað tíðin, sum er munurin á nýggju og gomlu amboðunum.



*Jústinus Olsen, djóralækni, heldur einum ”mønustingara” í hondini. Aftanfyri hann liggja nakrir ”blásturkrókar”. - Nýggju amboðini eru effektivari, og hvalirnir merkja minni pínu*
*mynd: Eirikur Lindenskov*

## FAKTA

Grind varð hildin til í Sandagerði seinnapartin í gjár ( mikudagin 13. sept.) Tað vóru 176 hval sum løgdu beinini - 1591 skinn íalt. Hesi skinn vóru býtt upp í 2124 drápspartar, 0,58 skinn í part. Sýslumaðurin Regin Jespersen upplýsir, at drápið gekk væl og øgiliga skjótt – umleið 10 minuttir. Øll grindin gjørdi landgongd.

*Kelda: Tórshavnar býráð*








**Starvsfólk aftaná skúlatíð til Baresso Coffee**

SMS letur upp nýggja Baresso café 25. oktober, og í tí samband søkja vit álítandi fólk til caféina. Gongur tú í skúla, hevur tú møguleika at søkja um arbeiði hjá okkum. Starvið verður sett frá 18. oktober 2006.

Arbeiðsuppgávur: At gera reint og rudda har gestirnir sita • At tryggja at uppgávur viðvíkjandi reingerð og annað, sum er neyðugt, verður gjørt • At gera kaffistovuna reina eftir afturlatingartíð og annars gera klárt til dagin eftir • Tilgerð og borðreiðing av okkara sermerktu kaffisløgum, køkum, tvíflísum og øðrum matvørum • Geva gestum góðar upplivingar við einum smíli.

Vit vænta av tær : At tú ert ágrýtin • Tú dugir at halda kaffistovuna reina og nossliga, tí hetta hevur stóran týdning fyri, at okkara gestir føla seg væl • Tú hevur eitt vinnandi smíl og ert í góðum hýri, so onnur gleðast við tær • Tú dugir væl at samstarva • Tær dámar at gleða onnur við tínum ágrýtni. Hevur tú spurningar viðvíkjandi arbeiðinum, kanst tú ringja til Anju á tel 210990.

baresso COFFEE

SEND UMSÓKN TIL : BARESSO • SMS • Á TRAPPUTRØÐNI • POSTBOKS 1059 • 110 TÓRSHAVN